# Myrt fimm hjúnafelagar



Hon sær út sum ein glað omma. Men 76-ára gamla Betty Neumar hevur seinasta mánaðin sitið handan rimar, ákærd fyri at hava útvega sær ein leigdrápsmann at myrða fjórða hjúnarfelaga sín, Harold Gentry. Løgreglan kannar nú um hon stendur aftan fyri deyðsføllini hjá øllum fimm hjúnarfeløgunum, skrivar cnn.com. Harold Gentry varð funnin skotin í heiminum hjá parinum í 1986, meðan Betty ikki var heima.Drápsmaðurin varð ongantíð funnin, men bróður hin myrda, Al Gentry, hevur ongantíð ivast í, at Betty stóð aftan fyri drápið. Í meiri enn 20 ár hevur hann trúliga heitt á løgregluna um at taka málið upp aftur. Nú er Betty Neumer so handtikin, ákærd fyri at hava leigað ein leigudrápsmann at skjóta Harold Gentry. Kanningar benda á, at Betty hevur sett seg í samband við fleiri leigudrápsmenn, tá hon skuldi finna ein til uppgávuna. Ein teirra smettaði til løgregluna, men hon lætst tó ikki um vón. Ikki fyrr enn nú.

# ráðaloysi

- Í fjør ringdu nógv viðskiftafólk og spurdu um hitapumpu, men tá veturin kom, ringdu minst líka nógv og spurdu seg fyri um nýggjan ketil. Tað eru eisini tey, sum hava fingið sær eina skipan við hitapumpu og hava ongan ketil, sigur hann.

### Hvat loysir seg?

Stjórin á Högv sigur, at sum sethúsaeigari við hitapumpu skalt tú forrenta 150.000 krónur meira yvir 20 ár enn ein annar, sum bara hevur ketil.

- Tá tú byrjar, er íløgan við hitapumpu umleið 50.000 krónur størri enn við vanligari skipan við ketli, og tá hitapumpan er eini 10 ára gomul, má hon skiftast.

Hann vísir á, at ein hitapumpuskipan uttan ketil kostar einar 100.000 krónur, meðan ein skipan bara við ketli kostar millum 30.000 og 40.000 krónur.

- Ein ketil heldur í minsta lagi í 20 ár og ofta tvífalt so leingi, meðan mett verður, at ein skipan við hitapumpu heldur í eini 10 ár.

Jákup sigur, at við eini hitapumpuskipan tvífaldast streymnýtslan í minsta lagi, og tí torir Högv ikki so væl at biðja fólk bara droppa ketilin.

- Hin besta loysnin er helst at kombinera tingini – við ketli og hitapumpu, og luft til luft-loysnin, sum hann tekur til, kostar onkustaðni millum 10.000 og 15.000 krónur. Hetta kann vera ein rímilig íløga, sum hjálpir til at halda oljunýtsluni niðri, leggur hann aftrat.

### Tað veldst um

Stjórin á Högv vísir á, at ymiskt er, hvussu stór sparingin við hitapumpuskipan er.

- Er høgt millum loft og gólv ella opið uppundir tróðurið, er sparingin lutfalsliga størri. Hitin endar undir loftinum, og ein hitapumpuskipan syrgir fyri, at hitin fordeilir seg runt um í rúmunum.

Men sambært Jákupi eru tað ikki øll, sum spara við hitapumpu.

- Eini nýggj og vælbjálvað hús spara einki við eini slíkari skipan. Har er einki at spara, tí oljunýtslan við vanligari sentralhitaskipan er frammanundan so lág. Í aðrar mátar brúkar hitapumpan nógvan streym, tá kalt er í veðrinum, sigur Jákup Olsen.

Stjórin á Högv heldur ikki, at tað eigur at vera uppgávan hjá privatfólki at føra orkupolitikk.

- Vit eiga í staðin at hava ein óheftan myndugleika, sum kann ráðgeva – uttan at vera heftur at nøkrum framleiðara ella veitara. Fólk mugu fáa at vita, hvat er fakta – og ikki fupp, um vit so kunnu siga, leggur hann aftrat.



*- Vit hava skift ketlar, har fólk hava spart upp í 30-40%. Vit hava eisini skift ketlar, har oljunýtslan er farin niður í eina helvt av nýtsluni frammanundan, sigur Jákup Olsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Soleiðis sær lítli ketilin út, sum Högv framleiðir til skip og bátar. Ketilin er bygdur til vanliga oljufýr*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ketlar til hús, skip og bátar

**- Tekniski framburðurin innan framleiðslu av ketlum hevur verið stórur, og hetta hevur eisini ført til, at tað hevur eydnast okkum at framleiða ein ketil, sum er ein rættiligur lágorkuketil, sigur Jákup Olsen**

FRAMLEIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin fríggjadagin vitjaði Sosialurin inni á gólvinum hjá Högv í Søldarfirði.

Høvuðsframleiðslan hjá felagnum er ketlar, bæði til sethús og størri bygningar, og felagið hevur seinastu tvey árini eisini framleitt ketlar til fleiri skip og bátar.

- Vit hava drúgvar royndir og hava leingi verið á marknaðinum við ketlum til sethús og bygningar. Øll árini hava vit arbeitt við at gjørt framleiðsluna betri. Í dag hava vit ein lágorkuketil (L2000), og vit tora at siga, at eingin ketil er á marknaðinum, sum er meira orkusparandi enn hesin. Vit tora eisini at siga, at eingin ketil av somu dygd og stødd er bíligari enn okkara.

Tað sigur Jákup Olsen, stjóri á Högv.

- Umframt at hava framleitt einar 1600 ketlar til sethús síðan umleið 1990, hava vit seinastu tvey árini eisini framleitt fleiri smærri ketlar til skip og bátar.

Stjórin vísir á, at felagið soleiðis hevur framleitt ketlar til fleiri Awi-bátar, frítíðarbátar, alibátar og aðrar útróðrarbátar.

- Norðlýsið og Magnus Heinason eru tvey av skipunum, sum sigla við ketlum, ið vit hava framleitt, sigur hann.

Jákup vísir á, at tekniski framburðurin innan hesa framleiðslu hevur verið stórur seinastu árini, og hetta hevur eisini ført til, at tað hevur eydnast teimum at framleiða ein ketil, sum er ein rættiligur lágorkuketil.

- L2000 er ein rørketil. Hann er ljóðleysur og umhvørvisvinarligur. Brennikamarið er runt, og hetta gevur eina sera góða forbrenning, eins og hitaflatan tá er nógv drúgvari enn við einum kantutum brennikamari.

Stjórin sigur, at allar hitaflatur í L2000 eru vatnkøldar, og roykurin verður leiddur gjøgnum rundar roykrásir, sum eisini eru vatnkøldar og hava roykleiðara.

- Roykgassið verður leitt gjøgnum flammuna eina ferð eyka, áðrenn tað fer út í skorsteinin. Hetta gevur eisini eina betri og reinari forbrenning.

Jákup Olsen sigur, at L2000 tekur umleið 150 litrar av vatni.

- Koparspiralurin til heita brúksvatnið verður hitaður væl og viðiliga alla tíðina, og tí er altíð nóg mikið av heitum vatni.

Högv framleiðir eisini størri ketlar, sum kunnu fáast við ella uttan útbúnað til brúksvatn.

- Lítli ketilin til skip og bátar (B18) er bygdur til vanliga oljufýr, og kann vera sera hentur til hita og heitt vatn í krana og brúsu, sigur Jákup Olsen, stjóri.